Seinasta Yngd á›renn summarste›gin

Bla›i› tú situr vi› í hondini í dag, er ta› seinasta, á›renn Yngd fer í summarfrí›. Tá Yngd kemur aftur í heyst ver›ur bla›i› broytt. Eitt nú ver›ur ta› eitt n‡tt layout sum lesarin skal venja seg vi› eftir summarste›gin.

Í hesum seinasta bla›num, á hesum sinni, fara vit at gera eitt sindur burur úr einum donskum ítrottarskúla. Ta› er alt meiri vanligt at bæ›i gentir og dreingir fara beinlei›is av landinum eftir at tey eru li›ug vi› 10. flokk. Ymiskt er, hvar hesi ungu fólk fara at royna seg. Onkur velur EFG, onkur annar HF ella student, og so eru ta› eisini tey sum velja at fara á ein háskúla. Innan fyri háskúlarnar eru ítrottarskúlarnir sera væl umtóktir. Fleiri føroyingar velja hesar ítrottarskúlar har tey vóna at kunna menna seg sum ítrottarfólk, og tey flestu lata væl at úrslitinum.

Á tónlistarliga økinum í Føroyum hendur eisini alla tí›ina okkurt. Í Gøtu og a›rasta›ni í Eysturoy hava fólk tiki› seg saman at stovna eitt tónleikafelag. Felagi› sum var› stovana› seint í 1998, ver›ur nevnt Grót. Felagi› skipar fyri konsertum, og sergliga er ta› losjan í Gøtu sum er karmur um hesar konsertir. Eisini er eitt av endamálunum hjá felagnum at útvega limum sínum betur umstø›ur, her ver›ur eitt nú hugsa› um venjingarhølir og anna› ungir tónleikarar hava tørv á. Grót er eitt sera virki› felag. Í summar hevur felagi› ætlanir um at skipa fyri fleiri ymiskum tiltøkum. Til okkurt av hesum tiltøkum ver›ur bólkurin Clickhaze aftur at hoyra.

Vit hava í Yngd seinastu tí›ina roynt at ummælt tann n‡ggjasta tónleikin á markna›inum. Vi› vælvild frá 3'aranum hevur hetta lati› seg gjørt. Eisini í dag eru tr‡ ummæli komin vi›. Tvær føroyskar fløgur og so ein útlendsk. Føroysku fløgurnar i› eru vi› í bla›num í dag eru seinna Kular Røtur útgávan og n‡ggja útgávan hjá Maluni Ey›unsdóttir. Iron Maiden standa fyri útlendska íslettinum. Teirra Brave New World útgáva far meiri eitt vi›mæli enn eitt ummæli.

Yngd fer til endans at n‡ta høvi› at takka øllum teimum sum vit hava samstarva vi› í heyst og vetur fyri sínda vælvild og stu›ul.

Eftir er bert at ynskja øllum ein gó›an mikudag, og eina gó›a summarferiu, og ta› er hervi› gjørt - Over and Out.

Send inn og vinn

3arin letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd". Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Fró›i Løkságar›

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Yngd

Ynskir øllum lesarum eitt gott summar

Grót rullar í summar!!

Tónleikafelagi› Grót úr Eysturoy, spennir seg rættiliga út í summar, tá teir fara at skipa fyri fleiri tiltøkum.

FRÓ›I LØKSÁGAR›

Tónleikafelagi› Grót í Eysturoy, var› stovna› í Novmeber mána›a í 1998. Líka sí›ani stovnanina, hevur felagi› skipa› fyri nógvum spennandi tiltøkum. Serliga losjan í Gøtu hevur veri› hugnaligi karmurin um øll hesi tiltøkini, men eisini fólk a›rasta›ni runt um landi› hava havt gle›i av arbe›inum hjá Grót.

Nú leygarkvøldi› var aftur skipa› fyri væleydna›ari konsert í losjuni í Gøtu, har Kári Sverrisson og fløugaktuelli Hanus G. Johansen luttóku. Rættuliga fitt av fólki motto upp í losjuni til hetta tiltaki›, sum ætalndi bara var› eitt av fleiri tiltøkum í summar.

Kári Sverrisson, sum tey flestu seta í samband vi› Ennekk spældi nøkur av sínum egnum løgum, sum hann plagar at framføra tá hann er einsamallur á palli. Hansus G. Johansen, gav saman vi› Aldubárini út eina n‡ggja fløgu í seinastu viku. Hetta er ein fløga sum er upptikin til konsertir, sum Hanus hev›i saman vi› Aldubárini í Nor›urlandahúsinum. Á fløguni eru fleiri av teimum løgunum sum tey flestu kenna Hanus fyri, umframt at n‡ggjari løg eisini eru vi›. Tó var ta› uttan Aldubáruna at Hanus var á pallinum í Gøtu leygarkvøldi›.

Hetta er tó ikki einasta tiltaki› tey í Grót hava ætlanir um at skipa fyri í summar. Eitt nú ver›ur skipa› fyri forkunnugari konsert tann 10. juli. Til hesa konsertina ver›ur luttøka úr so einum so fjarskotnum sta›i sum Afrika. Dandala eitur bólkurin sum fyri ein part ikki er so heilt ókendur í Føroyum. Ta› er nevniliga solei›is at ein av limunum í bólkinum hevur roynt seg saman vi› Clickhaze fyrr. Talan er um ein percussion spælaran, sum eitt skifti var skiftisnæmingur í Føroyum, og samstundis percussionspælari hjá Clickhaze. Hetta var um ta› mundi at bólkurin vi› stórum hepni luttók í Prix Føroyar kappingini.

Nú vit tosa um Clickhaze, so skal eisini nevnast at bólkurin fer at luttaka á somu konsert. Sjálvt um tey eru givin at spæla saman, so hava limirnir avgjørt at møtast aftur til eina sonevnda reunion konsert. Møguleiki er eisini fyri at tey fara at spæla saman nakrar fer›ir í summar.

Limirnir í Clickhaze hava veri› eitt sindur spjaddir sí›ani tey góvust at spæla saman. Eivør hevur sum sagt mest gjørt um seg saman vi› Eivør Pálsdóttur Kvartett, sum nú nevnir seg Ivory. Petur P Jensen, sum var forsangari í Clickhaze, hevur ikki gjørt so nógv um seg á tónlistarliga økinum. Umframt at syngja í Clickhaze, er hann eisini ein av høvu›smonnunum í Visible Fish. Heldur ikki hesin bólkurin hevur tó gjørt naka› um seg í seinastuni. Bassleikarin í Clickhaze, Jens L. Thomsen, hevur sí›an Clickhaze løgdu árarnar inn, fyri ta› mesta roynt seg sum trummusláara í bólkinum Marigold. Hesin bólkurin, sum eisni hevur sín uppruna í umhvørvinum rundan um losjuna í Gøtu, hevur fyrr í summar roynt seg sum upphitingarbólk hjá Glorybox, sum vóru í Føroyum á konsertfer› fyri stuttum. Á hesi konsertfer› spældu Glorybox og Marigold í Havn, Gøtu og í Klaksvík. Annars ver›ur Glorybox vi› føroyska guitarleikaranum at hoyra á Roskilde Festival um eina gó›a viku.

Ta› ver›ur rættuliga forkunnugt at kunna hoyra Clickhaze aftur í summar. Hesin bólkurin sum hugtók so nógv til Prix Føroyar kappingina, var› mettur at ver›a eitt av mest n‡skapandi føroysku nøvnunum um ta› mundi bólkurin var frammi. Tó var› honum ikki lív laga›, og tey fóru hvør til sítt. Spennadi ver›ur av vita hvat tey hava at bjó›a uppá í summar.

Seinasta navni› sum ver›ur vi› á konsertini tann 10. Juli er bólkurin Enekk. Enekk er ein sera vælumtóktur bólkur. Enekk hevur higartil lati› 3. útgávur úr hondum. Limirnir í bólkinum eru fyri ta› mesta spjaddir runt ymsa sta›ni, og tískil liggur illa fyri hjá teimum at spæla saman. Í summar ver›a limirnir í bólkinum savna›ir, og ætlandi fara teir at spæla eitt sindur tá.